VALGREINAR

# Útbúgvingar í Føroyum

**Sylverius Jacobsen**
*Valevni hjá Javnaðarflokkinum í Eysturoy*



Hjá Javnaðarflokkinum er útbúgving av fólki eitt hjartamál.

Fólkaskúlin, sum er grundin undir allari útbúgving, er síðani kreppuna ikki prioriteraður nóg høgt. Tað vísir kreppan í føroyska fólkaskúlanum í dag. Tað er ikki nokk at gera eina nýggja fólkaskúlalóg og so lata standa til. Tá er hon til onga nyttu.

Fyri at gera fólkaskúlan til fólksins skúla, krevst meira enn ein lóg. Har krevjast umstøður, so skúlin kann virka eftir hesi lóg. Játtan at gjalda hesa lóg skulu fylgja við.

Tað eru landsins myndugleikar, sum hava hægstu ábyrgd av fólkaskúlanum. Javnaðarflokkurin fer at taka hesa ábyrgd á seg, og seta fólkaskúlan á dagsskránna. Ikki bara í orðum, men eisini í verki.

Miðnámsúrbúgvingar nar skulu mennast, so øll, sum hava hug og hegni skulu kunna taka eina miðnámsútbúgving.

Men Javnaðarflokkurin, sum er flokkur verkamanna og lønmóttakaranna, prioriterar handverkaraútbúgvingar nar høgt.

Vit hava brúk fyri øllum hondum her heima hjá okkum, tí skulu okkara ungu, sum hava hug til handans arbeiði, eisini hava góða útbúgving. Vit mugu ikki forsøma hesi í okkara ungu, tí vit hava brúk fyri teimum, og hava tey hug eftir lokna læru at fara út um landsoddarnar at royna seg, skulu tey ikki standa aftanfyri onnur ung í okkara grannalondum.

Somuleiðis prioriterar Javnaðarflokkinum útbúgving av fólki innan fiskivinnuna. Fólkunum á flakavirkunum skal standa í boði eina útbúgving í teirra yrki, sum mennir tey í teirra arbeiði.

Sjómansútbúgvingarnar, heilsurøktaraútbúgvingarnar, pedagokútbúgvingin, sjúkrasystirútbúgvingin, læraraútbúgvingin og aðrar útbúgvingar, sum gera land okkara til eitt framkomið land, fer Javnaðarflokkurin at prioritera, um flokkurin kemur í samgongu eftir valið 30 apríl 2002.

# Valið er avgerðin um tína og mína framtíð

**Heðin Zachariassen**
*valevni Fólkafloksins*



Alt frælsi er avgerandi um vit eiga politikarar, sum síggja álvaran í, hvussu stóran týdning tað hevur at stýra við ábyrd og skinsemi, fíggjarliga og umsitingarliga; okkara landi og fólki til frama og framburð.

Sjálvstýriskósin er sett og er við Fólkaflokkinum tann fíggjarliga besta og ábyrdarfulla kósin, sum nakar flokkur hevur víst í verki og sum Fólkaflokkurin vil halda fast við. Fólkaflokkurin er besta trygdin fyri m.a. einum vælstýrdum og tryggum

- Fiskivinnupolitikki
- Vinnupolitikki
- Eldrapolitikki
- Heilsupolitikki
- Íbúðarpolitikki
- Umhvørvispolitikki
- Samferðslupolitikki

So góði veljari, góðu Norðstreymoyingar, ynskir tú einar tryggar Føroyar, so er rætta avgerðin, at tín krossur verður settur við lista A Fólkaflokkin. Seti ein sterkan Fólkaflokk á ting.

Gott val!

# Vit eru realpolitikkur

**Dánial Petur Hansen**
*Valevni Sjálvstýrisfloksins í Eysturoy*



At Føroyar er tað besta landið í heiminum at vaksa upp og liva í, eru flestu føroyingar uttan iva meira ella minni samdir um - í øllum førum um vit veruliga seta okkum niður og hugsa okkum um!

Flest øll eru vit tó helst eisini samd um, at nógv kundi og burdið verið annnarleiðis og betri, men semjan um hvat kundi og burdið verið annarleiðis og betri er ivaleyst nakað minni.

Og semjan um hvat og hvussu nógv átti at verið betri, er væl tá alt kemur til alt ikki serliga stór - hetta fær neyvan verið annarleiðis, og skal væl heldur neyvan verða tað!

Tá ið nú val stendur fyri framman, leggja allir flokkar og flest øll valevnir fram sína hugsan um hvat átti at verið betri.

Tað er væl eisini eitt av høvuðsendamálunum í einum valstríðið.

Soleiðis hevur Sjálvstýrisflokkurin sent ein faldara út í hvørt hús í Føroyum, sum greiðir frá valská floksins til løgtingsvalið hesaferð.

**Ríkisfelagsskapurin**

Alt bendir á, at tað sum er avgerandi fyri veljaran, tá hann skal seta sín kross til løgtingsvalið er, um atkvøðan fer til ein flokk, sum vil virka innan fyri ríkisfelagsskapin ella uttan fyri ríkisfelagsskapin.

At hetta er vorðin ein so týðandi spurningur fyri Føroya fólk, at alt annað má koma í aðru røð, er eftir okkara tykki heilt burtur við og sera óheppið.

Hóast tað er at lýsa støðuna einfaldari enn hon er, kann ein siga, at løgtingsvalið hesaferð soleiðis sær út til at snúgva seg um "formin heldur enn innihaldið".

Formaður Tjóðveldisfloksins, Høgni Hoydal, roynir at villeiða føroyingar við sínum myndatalum.

Til hetta kann sigast, at tað sum nú verður roynt, er gera sjálva rammuna av myndini til tað alt avgerandi.

Sjálvsagt hevur ramman stóran týdning fyri hvussu myndin tekur seg út, men um innihaldið á myndini ikki er í lagi, so hjálpir lítið at skilda uppá rammuna.

Fyri Sjálvstýrisflokkin hevur innihaldið á myndini størri týdning enn ramman.

Til eitt av løgtingsvalunum í 80'unum varð tá verandi formaður Tjóðveldisfloksins spurdur um hvat Tjóðveldisflokkurin fór at gera, um flokkurin kom út í Tinganes, og svaraði hesin: - tá fara vit at hugsa!

Undirritaði er bangin fyri at støðan hjá Tjóðveldisflokkinum ikki er stórt øðrvísi í dag. Svarið uppá hvat flokkurin hevði ætlað sær at gjørt, um hann hevði fingið loysingina hevði væl verið tað sama: - tá fara vit at hugsa!

**Sjálvstýrisflokkurin ein heimastýrisflokkur**

Sjálvstýrisflokkurin er ein av teimum gomlu heimastýrisflokkunum, og hevur havt sum eitt av sínum aðalmálum, at arbeitt verður fram ímóti, at okkara oyggjar gerast meira og meira sjálvbjargnar, so hvørt haldgott grundarlag er fyri hesum - stig fyri stig.

Ein politikkur, ið bæði Javnaðarflokkurin við sínum sjálvstýrislógaruppskotið, Fólkaflokkurin við sínum samveldisuppskotið, og eisini Sambandsflokkurin við sínum nýskipanaruppskotið hava tikið til sín. Hesir flokkar ganga upp í navnið á uppskotinum, meðan innihaldið hevur størri týdning fyri Sjálvstýrisflokkin.

Undirritaði er eisini ein at teimum, ið hvørki hevur verið nøgdur við mátan fullveldissamráðingarnar hava verið førdar við danir uppá, ella við tí ferð ætlanin varð at gjøgnumføra fullveldi uppá.

Onkur hevur ført fram, at teir tveir landsstýrismenninir flokkurin fekk fyri sínar tveir tinglimir hetta landsstýrisskeiðið, vórðu dýrt keyptir, og er ivaleyst nakað um tað.

Fyrrverandi Danskur forsætismálaráðharri er mangan endurgivin fyri at siga, at "man har et standpunkt til man tager et nyt".

Fleiri taka eitt tílíkt úttalilsi sum tekin uppá eina veika støðu, men hetta, at hava evni til at flyta seg, evni til at taka eina aðru støðu, er ikki ein veikleiki, men ein styrki.

Fyrrverandi formaður í tingbólkinum hjá sambandsflokkinum, skal soleiðis einaferð hava sagt, at tað kann gott verða, at Føroyar einaferð skal loysa frá Danmark, men so skal tað verða við Sambandsflokkinum.

Eisini tað "nýggja stjørnuskotið" hjá Sambandsflokkinum í Norðoyggjum, vísir dúgliga á hvussu og hvussu skjótt vit kunnu sleppa av við blokkstuðulin úr Danmark, og eitt av valevnum sambandsfloksins í Norðoyggjum skrivar 8. apríl í ár soleiðis í dimmu: ein hóvligur sjálvstýrispolitikkur, ella sum tað eisini verður nevnt - stig fyri stig á sjálvstýrisleið - er rætti vegurin at ganga.

So hvør veit, kanska hevur Sambandsflokkurin eina langsigtaða interna loysingarstrategi.

Samstundis ávarar fyrrverandi tingformaður sambandsfloksins í dimmu viku seinnu soleiðis: "sama hvørji skinn við stig fyri stig litum summir seyma uppá seg nú upp undir løgtingsvalið".

Um hetta skal skiljast sum ein ávaring frá fyrrverandi tingformanni sambandsfloksins ímóti at velja Sambandsflokkin ella eitt av valevnum floksins er ringt at vita!

**Virðingin fyri hvørjum øðrum umráðandi**

Um Føroyar einaferð í Framtíðini ikki skulu verða ein partur av "tí formliga" ríkisfelagsskapinum við Danmark, er ikki óhugsandi, men ein tílík broyting í Ríkisrættarligu støðu Føroya verður ikki gjørd við Sjálvstýrisflokkinum fyrr enn Føroya fólk hevur verið spurt á eini fólkaatkvøðu.

Men, tað sum til eina og hvørja tíð umræður er, at talan er um eitt virðuligt forhold landanna millum, og at londini soleiðis hava tað neyðugu virðingina yvir fyri hvørjum øðrum.

Munurin á Sambandsflokkinum og Sjálvstýrisflokkinum er annars, at meðan Sambandsflokkurin í síni konserativu liberalismu hevur stríðst fyri einum donskum Føroyum, so hevur Sjálvstýrisflokkurin í síni meira sosialu liberalismu stríst fyri einum føroyskum Føroyum.

Stóð tað upp til sambandsflokkin høvdu vit møguliga enn í dag ikki sloppið til próvtøku á skúlunum á okkara egna máli, ikki kunnu hoyrt okkara móðurmál í kirkju, ikki kunnu flagga við merkinum, osfr.

Tað kann verða, at tílíkt ikki hevur so stóran týdning fyri Sambandsflokkin, men fyri okkum í Sjálvstýrisflokkinum er her talan um nøkur grundleggjandi viðurskifti, sum vit halda hava alstóran týdning fyri samfelag og sjálvsvirðing okkara.

Vit í Sjálvstýrisflokkinum trúgva, at føroyingar megna tað teir vilja!

**Høvuðsmál komandi valskeið**

Í einum komandi valskeiði hevur Sjálvstýrisflokkurin soleiðis sett sær fyri m.a. at virka fyri hesum høvuðsmálum:

Einum familjupolitikki, har dentur verður lagdur á vælfrælsi hjá tí einstaka - ungum sum eldri.

Einum skattapolitikki, har miðalinntøkur ikki verða skattaðar sum háinntøkur.

Einum vinnulívspolitikki, har dentur verður lagdur á at gera lóggávuna einfaldari og ábyrgdarbýti greiðari millum alment og privat.

Einum virðiligum eldrapolitikki, har havt verður í huga, at tey eldru eru annað enn pensiónir og røktarheimspláss.

Einum íbúðarpolitikki, har dentur verður lagdur á at betra um møguleikarnar hjá bæði ungum og eldri at seta búgv.

Heldur enn at byggja sín politikk á hugsjónir, sum tíðin er farin frá, og sum er við til at spjaða, byggir Sjálvstýrisflokkurin á ein realpolitikk, sum er við til at byggja brýr og sameina.

Tað hevur ongantíð verið meira brúk fyri Sjálvstýrisflokkinum í føroyskum politikki enn nú.

Far tí á val 30. apríl og vel Sjálvstýrisflokkin ella eitt av valevnum floksins. Gott val!



VALGREINAR

# Trúgvandi í Føroyum, standið saman!

**Pól Hentze**
*Valevni Miðfloksins*

Tað er ongin grund til at trúgvandi her á landi standa so spjadd politiskt, sum tey gera í dag.

Tvørturímóti eru nógvar grundir til at vit stóðu saman. Til dømis trúgva vit ivaleyst øll líkamikið hvørja samkomu vit hoyra til, upp á ein Guð, um hevur áhuga í hvørjar avgerðir vit taka politiskt, um vit nú stuðla giftarmáli ella premiera tað sokallaða pappírleysa »forholdið«.

Ella tak alheimsstøðuna. Vilja vit stuðla Ísrael við tí grundgeving, at Bíblina sigur tað? Ella vilja vit verða við til at verja tað ófødda barnið, tí at lívið er ein heiløg Guðgivin gáva?

Ein hvør politisk idéologi skuldi ongantíð verið eitt mál í sjálvum sær. Gongur tú blint inn fyri t.d. sosialismu stuðlar tú tonkum um at skapa eina góða tilveru á jørðini uttan Guð, nøvn sum Marx og Lenin máttu sagt nóg mikið!

Stuðlar tú ultra høgra, so kenna vit hvat, ið hendi tá ið Hitler kom fram á politiska pallin í Týsklandi. Úrslitið var sorgarleikur uttan líka í heimssøguni.

Eg rokni við, at nevndu persónar eru fyrimyndir hjá okkara politisku flokkum, sum bjóða seg fram nú á døgum í Føroyum.

Onkur heldur kanska, at tað er heldur nasadjarvt, at kalla ein flokk kristiligan, men tað gongur klárt fram av stevnuskránni hjá Miðflokkinum, at aðalmálið hjá flokkinum er, at grunda Føroyar á Guðs orð, og at byggja okkara lítla land á kristin meginsjónarmið, við kærleika til fólkið sum drívmegi í tí politiska arbeiðnum.

Guð signi Føroyar!

# Nú nærkast…

**Finnur Jensen**
*Valevni Sambandsfloksins í Suðurstreymoy*



Aftanfyri hvørja gerð er ein ætlan – men hasa fullveldisætlana verði eg altso ikki klókur av. Hvat skal eg við einum fullveldi, sum eg hvørki verði ríkari, sterkari ella frælsari av? At tað finnast fólk, sum orsakað av tjóðskaparligum undirlutakenslum, tvinga seg til at loysa, tað harmist eg um. Men hví skal tað ganga út yvir okkum onnur, sum longu sprutta av frælsi?

Mín kæri lesari…eg fari ikki at heita á teg um at velja ein ávísan flokk, tí tað dugir tú betri sjálvur at gera eftir bestu sannføring – men eitt kann eg gera, og tað er at ynsja tær eitt gott sambands val og eitt vánaligt fullveldisval!

# Skattalætti til miðalinntøkur – tað er familjupolitikkur

**Dánial Petur Hansen**
*valevni Sjálvstýrisfloksins í Eysturoy*



Ein progressivur skattastigi, sum tann vit nýta í norðurlondum, soleiðis eisini í Føroyum, byggir á, at skatturin á tí síðst forvunnu krónuni (marginalskatturin) veksur hægri inntøkan verður.

Inntøkurnar verða vanliga býttar upp í láinntøkur, miðalinntøkur og háinntøkur, og hækkar skatturin á tí síðst tjentu krónini í stigum, sum verða mett at samsvara hesum inntøkuuppbýti.

Tvs. at marginalskatturin í grannalondum okkara hækkar vanliga ikki síðsta stigið fyrr enn talan er um eina háinntøku.

Í Føroyum hækkar skatturin longu síðsta stigið (13%) eftir at ein inntøka er farin upp um 150.000 kr.

Við tað, at ein inntøka ímillum 150.000 kr. - 250.000 kr. má metast at verða ein miðalinntøka í Føroyum í dag, er tað soleiðis ein veruleiki, at miðalinntøkur verða skattaðar sum háinntøkur.

Nógv eru tey sum soleiðis gjalda út við 60% í skatti av tí síðst forvunnu krónuni, hóast tey bert hava tað, sum má metast at verða ein miðalinntøka.

Markið má hækkast og marginalskatturin lækkast

Markið fyri nær skatturin verður hækkaður tey seinastu prosentini (í dag 13%) má tískil hækkast.

Málsetningurin má verða, at hetta loftið verður sett, har mett verður at háinntøkurnar byrjað. Í dag kann ein neyvan tosa um eina háinntøka fyrr enn talan er um eina inntøku omanfyri 250.000 kr. - 300.000 kr.

Yvirhøvur tað, at hava ein marginalskatt uppá 60% er alt ov høgt, og er við til at taka arbeiðshugin frá fólki. Áhugin fyri at gera ein eykainnsats er ikki nóg mikið til staðar, og endar hetta ofta bert við at leggja eitt enn størri trýst á lønarlagi.

Ein annar málsetningur má tí verða at lækka marginalskattin av tí síðst forvunnu krónuni, soleiðis at hesin ongantíð fer upp um tey 50%.

Sjálvstýrisflokkurin vil tey komandi fýra árini virka fyri, at omanfyri standandi málsetningar verða náddir.

Far tí á val 30. apríl og vel Sjálvstýrisflokkin, ella eitt av valevnum floksins.

Gott val!

# Eingir meskar í danska trygdarnetinum

**Jórun Høgnesen**
*valevni Tjóðveldisfloksins í Norðoyggjum*



Sambandsflokkurin hevur í valstríðnum ført fram, at vit hava størri møguleikar og frælsi í ríkisfelagsskapinum enn sum sjálvstøðugt ríki. Sum dømi verða ofta nevndir teir møguleikar, vit hava fyri víðari útbúgving í Danmark. Alt gott um tað at ein hópur av føroyingum hava nomið sær víðari lesnað í Danmark, men rákið tey seinnu árini hevur verið, at ungdómurin í størri mun er farin til onnur lond at fáa sær víðari útbúgving. Hetta haldi eg eisini vera eina sunnari gongd, soleiðis at tey eftir lokna útbúgving kunnu koma aftur við íblástri ymsastaðni frá.

Nevnd verða eisini onnur øki, har vit hava fyrimun í danska samfelagnum, eitt nú innan heilsu- og almannaøkið. Til hetta er at siga, at munurin millum tær avtalur sum eru millum Norðurlond, og so tey rættindi vit hava í Danmark á nevndu økjum, er ikki so stórur.

Á øðrum økjum er tað beinleiðis ein vansi og avmarking, at vit eru í ríkisfelagsskapi við Danmark.

**Ríkisfelagsskapurin ein vansi**

Ríkisfelagsskapurin førir eisini við sær, at vit ikki kunnu fáa sjálvstøðuga umboðan í eitt nú ST og Nato. Vit hava eisini í ríkiligt mát sæð, hvussu danska stjórnin hevur spent bein fyri, at vit koma á tal við hesar felagsskapir. Í Føroyum gongur eisini sjón fyri søgn, at føroyskir myndugleikar púrasta eru settir út av spælinum, tá hernaðarútbyggingar eru farnar fram í landi okkara. Fyri umleið tveimum árum síðani kom undan kavi, at Skálafjørðurin var ætlaður sum krígshavn í krígsstøðu.

**Vit megna tað, vit vilja**

Nýggjar kanningar hava víst, at lønsemið í føroysku fiskivinnuni er betri enn í okkara næstu grannalondum. Her er ein hugburðsbroyting farin fram, og fólk í fiskivinnuni hava brotið upp um armar, síðani stuðulin til vinnuna var avtikin. Eins og í fiskivinnuni ber til at bróta upp um armar á øðrum økjum og betur at fáa gagnnýtt landsins tilfeingi. Í kreppuni í nítiárunum var einki danskt trygdarnet undir okkum, heldur tvørturímóti, tí danska stjórnin, Fíggjareftirlitið og Den Danske Bank hugsaðu meira um egin áhugamál enn at bjara føroyska fólkinum úr kreppuni. Høvdu vit ikki ein sterkan Tjóðveldisflokk í samgonguni, so høvdu fíggjarligu avdúkingarnar helst ongantíð verið komnar undan kavi, einki endurgjald var komið aftur til Føroyar, og eyðmýkingin av føroyingum hevði sostatt verið fullkomin.

**Føroyingar gera seg galdandi á nógvum økjum**

Støðan í dag er tann, at føroyingar gera seg galdandi á nógvum økjum úti í heimi. Grannalond okkara eru farin at hyggja henda vegin eftir okkara fiskidagaskipan og nú í seinastuni eftir lønseminum í okkara fiskivinnu. Føroyingar gera seg galdandi á altjóða støði í gransking innan heilsu og havumhvørvi. Føroyskur høvundur fekk nú um dagarnar norðurlendska virðislønfyri leikritið Eitur nakað land week-end, og føroyskir miðnámsskúlar hava fleiri ferðir vunnið europeiska kapping innan handil og ídnað, sokallaða European Business Game. Í løtuni er Heidi Andreassen í uppskoti um heimsheiti í svimjing, so tað grør um gangandi fót.

Stórur partur av Føroya fólki vil, at Føroyar skulu fáa fullan limaskap og luttaka í olympisku leikunum á hædd við onnur lond. Kjak hevur í seinastuni tikið seg upp, um hetta letur seg gera, tí eitt krav fyri upptøku er, at limalondini skulu hava fult sjálvstýri.

Eg haldi, at tað verður ringt at fáa onnur at viðurkenna Føroyar ájavnt við onnur lond, um føroyingar sjálvir ikki góðtaka, at Føroyar skulu verða eitt sjálvstøðugt land. Henda viðurkenning má fyrst og fremst koma frá okkum sjálvum.

**Tí ræður um**

- At trúgva upp á framtíðina
- At umsita okkara ognir, soleiðis at øll fáa gagn av ríkidøminum á sjógvi og landi
- At hava áræði og treysti til at virka so, at øll skulu hava tað gott í okkara landi
- At halda seg til fullveldiskósina

**Tað ræður stutt sagt um at velja Tjóðveldisflokkin 30. apríl.**

www.tjodveldi.fo
jorunh@post.olivant.fo